Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Javnstilla akfør í vegskattinum

Spurningar:

1. Fer landsstýrismaðurin at leggja uppskot fram fyri Løgtingið, sum javnstillar el- og vetnisbilar við aðrar bilar í vegskattinum?
2. Um ja, nær verður eitt tílíkt uppskot lagt fram?
3. Um nei, hvør er so orsøkin til hetta?

Viðmerkingar:
Tað koma alsamt fleiri elbilar á vegirnar í Føroyum. Sambært tølum hjá Akstovuni frá 1. juni 2026 so vóru 3.119 elbilar skrásettir av tilsamans 28.411 persónbilum, svarandi til umleið 11% av persónbilunum í Føroyum.

Elbilar rinda bert 1.500 kr. í vegskatti, sum er á leið ein triðingur av tí, sum aðrir persónbilar rinda í miðal. Samstundis kann staðfestast, at elbilar eru munandi tyngri enn aðrir persónbilar. Hetta viðførir eitt enn størri slit á okkara vegakervi – sum longu nú krevur munandi viðlíkahald – so hvørt talið av elbilum veksur.

Á Løgtingi, 17. juni 2026

Steffan Klein Poulsen